Norska Smedvig bjó›ar seg til at bora

Boriskipi› West Navion, sum herfyri bora›i vi› Grønlandi, og sum norska felagi› Smedvig bjó›ar sær at bora vi› Føroyar

OLJULEITING OG BORIPALLAR/SKIP
Jan Müller

Nú leiting skal byrja vi› Føroyar um minni enn eitt ár hyggja oljufeløgini eftir egna›um boripallum ella boriskipum. Ta› hevur veri› avmarka›, hvussu nógvir egna›ir boripallar til hetta djúpa farvatni› hava veri› tøkir. Ta› er tó komi› fram, at bæ›i BP og Statoil hava funni› boripallar, men enn er einki ítøkiligt frætt frá Amerada Hess, sum tó hevur bo›a› frá, at ta› fer at bora komandi ár.

Nor›menn og norskar fyritøkur gera seg nógv galdandi í altjó›a oljuvinnu og eru teir eisini fúsir at vera vi› til at bjó›a fram sínar borieindir. Kenda felagi› Smedvig er eitt av feløgunum, sum fegi› sær, at oljufeløgini brúka tess pallar ella skip til leiting á føroyskum øki. Christian Bull Erikssonn er stjóri í stóru Smedvig-fyritøkuni. Sosialurin hitti hann á oljumessuni í Stavanger, har hann m.a. n‡tti høvi til at hitta borgarstjóran í Havn, Leiv Hansen og Poul Mohr, stjóra á Skipasmi›juni í Havn.

Christian Bull Eriksson sigur, at Smedvig fegi› vil bjó›a fram borieindir sínar til oljufeløgini. Teir hava sum er eitt boriskip, West Navion, sum eisini Stataoil eigur part í og sí›ani ein boripall, West Venture, sum eisini er egna›ur til djúpa vatni› á Atlantsmótinum.

-Vit hava júst bora› fyri Statoil, Phillips og Dong í Grønlandi. Nú gekk tann boringin ikki so væl, men West Navion er ætla› til nettupp Nor›uratlantshavi›, úr Noregi og vestur til Kanada og arktiska øki› og har eisini lei›irnar vi› Føroyar sigur Smedvigstjórin, sum fegin sær, at skipi› ver›ur brúkt á øllum Atlantsmótinum.

Ta› er sera væl útgjørt til at arbei›a á djúpum vatni og stóri fyrimunurin vi› tí er, at ta› hevur tveir boripallar umbor›, og ta› merkir, at ta› er munandi effektivari enn ein vanligur boripallur. Skipi› kann so eisini hava meira av rørum o.ø tyngri tilfari umbor›. Uppá fyrispurning um slíkt skip ikki fer at gera eina oljuútger›arhavn í Føroyum óney›uga sigur Christian Bull Eriksson, at ta› er ikki so. Tí teir koma altí› at hava brúk fyri útger›arhavn, men ta› er rætt, at tey kunnu vera longu úti í senn uttan at skula fara eftir útger›.

Stór fyritøka

Tilsamans 3000 fólk arbei›a hjá Smedvig kring alla ver›ina. Felagi› eigur seks pallar, sum bora í Nor›sjónum, me›an einir 10 minni pallar arbei›a í Asia. Felagi›, sum er ein tann størsti borientreprenørurin í Nor›urlondum og millum størstu fyritøkurnar í Noregi, umsetti í fjør fyri gó›ar 3 milliardir, tvs. umlei› ta› sama sum føroyska fíggjarlógin ljó›ar uppá.

-Vit vilja fegnir vera vi› í Føroyum, men ta› er sjálvandi upp til operatørarnar, oljufeløgini, um tey vilja brúka okkara tænastur í Føroyum sigur Christian Bull Eriksson. Smedvig eigur helvtina í West Navion, me›an Navion, sum Statoil og Rasmussen eiga, eigur hina helvtina.

Christian Bull Eriksson hevur arbeitt í oljuvinnuni í 20 ár og veri› stjóri hjá Smedvig í skjótt tvey ár.

Tá vit spyrja hann um oljutilgongdina og ávirkanina á føroyska samfelagi›, so heldur hann ta› vera umrá›andi ikki at seta vónirnar hægri, enn realistiskt er og sigur um somu tí›, at ta› er umrá›andi, at vit megna at st‡ra gongdini. Besti lærdómurin føroyingar kunnu fáa frá norsku royndunum er at hava ein stabilan útvikling og her ikki minst hvat lógarverkinum og útbjó›ingini vi›víkur.

Smedvig kann eisini bjó›a fram henda stóra boripallin, West Venture, til at bora á djúpum vatni vi› Føroyar.

Stjórin í Smedvigfyritøkuni, Christian Bull Eriksson vi› høgru li› Leiv Hansen, borgarstjóra, her saman vi› kendum nor›monnum og føroyingum á eini samkomu í heiminum hjá Noru Smedvik, einkjuna eftir stórvinnulívsmannin Smedvig

Skeivt at tvinga oljufeløg at bora í basaltinum

-Eg haldi ta› hev›i veri› skeivt av føroyskum myndugleikum at kravt av oljufeløgunum, sum fingu tilluta› part av Gullblokkunum, at tey afturfyri skuldu lova› at bora brunnar á basaltinum heldur Chris Kernick, sum arbeiddi á skrivstovuni hjá Texaco í Føroyum, á›renn hann var noyddur at fara avsta› aftur, nú felag hansara einki loyvi fekk.

Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálast‡rinum og Scott Albertsson frá Anadarko uttan fyri Nor›urlandahúsi›, tá loyvini vór›u handa› í heyst.

Oljuleiting og basalt
Jan Müller

Scott Albertsson starvast hjá amerikanska oljufelagnum Anadarko, sum er eitt av feløgunum, sum hevur fingi› tilluta› eitt 9 ára loyvi inni á basaltinum á føroyska landgrunninum. Slíkt loyvi merkir, at felagi› hevur bert bundi› seg til at gera seismiskar og a›rar kanningar komandi 3 árini. Í Sosialinum í gjár seg›i Chris Kernick frá Texaco, at føroysku mynguleikarnir áttu at kravt av oljufeløgunum, sum fingu 6-ára loyvi í Gulløkinum eisini at bora í basaltumrá›num fyri vestan og nor›an. Tí vi› ikki at seta fram slíkt krav, so ver›ur torført at fáa oljufeløgini at vá›a stórvegis í eini 2. útbjó›ing.

Hesum er Scott Albertsson heilt ósamdur vi› honum í. Hann sigur, at oljufeløg fara alla tí›ina at ver›a áhuga› í at leita eftir olju í n‡ggjum økjum, antin hesi eru fjald av basalti ella ikki. Hvat vi›víkur einum stórum parti av føroyska landgrunninum er ta› galdandi, at ta› í løtuni manglar tøkni til at kunna síggja ni›ur gjøgnum basalti›.

Scott Albertsson, sum 17. august var stæddur í Nor›urlandahúsinum fyri at taka ímóti loyvinum hjá Anadarko, heldur ta› ikki vera rætt at tvinga oljufeløg til skula bora brunnar, har ta› ikki er møguligt at lokalisera teir nóg væl. Oljumálast‡ri› hevur valt at lata feløgum sum Anadarko og Statoil 9 ára loyvi fyri nettupp at kunna lokalisera stø›ini, har borast kann um nøkur ár.

-Vit taka so sanniliga eisini ein vá›a, hóast hesin ikki er at bora ein brunn men heldur at brúka orkuna til vi› tí røttu tøknini at finna ta› rætta plássi› til at bora ein brunn á basaltinum. Scott Albertsson sigur, at tá tøknin til at kunna lokalisera rætta sta›i› at bora á basaltinum er komin uppá pláss og vit hava úrslitini frá boringunum í Gulløkinum at halda okkum til, so fer man at kunna taka eina stø›u til at skunda undir eina boring.

Tekur tí› at loysa gátu

Scott Albertsson vi›gongur, at ta› fer at taka tí› og orku at loysa basaltgátuna. Ta› er eisini tí, at man hevur lati› 9 ára loyvi fyri at finna út av, hvar man skal seta borin í.

Hann heldur ta› hev›i veri› skeivt at kravt av feløgum sum BP, at tey skulu lova at bora brunn í basaltinum fyri t.d. hvønn brunn teir bora í Gulløkinum. -Skuldu teir gjørt ta›, hev›i veri› ney›ugt at fingi› tilluta› so stór øki, at ta› hev›i avmarka› møguleikarnar hjá myndugleikunum at skipa› fyri komandi útbjó›ingum. Hann heldur myndugleikarnir hava funni› eina sera skilagó›a javnvág.

Anadarko-stjórin heldur tí ikki, at ta› fer at gera naka› gott at skula bora ein brunn á tí skeiva plássinum á basaltinum og so fáa ring tí›indi burturúr. Ta› hev›i veri› minni lovandi fyri eina 2. útbjó›ing enn at brúka tí›ina og orkuna rætt sum teir nú gera.

-Kunnu vit brúka betri tøknifrø›i, sum kanska ikki er til í dag men, sum kann vera tøk í næsta ár t.d. til at finna eitt gott pláss til at bora á, og vi› møguligum lovandi úrslitinum frá boringini í Judd basenginum sum grundarlag, so kann man fáa naka› skilagott burtur úr vi› at bora seinni.

Scott Albertsson sigur, at teir hava lova› at gjøgnumføra eina arbei›sskrá, har teir fara at skjóta seismikk longu næsta ár. Enn ov tí›liga at siga, hvussu nógvir pengar skulu brúkast til slíkt endamál. Men tey mugu koma at gera ta› av tí›liga í prosessini, sole›is at man kann gera av, um fari› ver›ur at bora í tí økinum, sum í løtuni er partur av 9 ára loyvinum.

Haldi› fast

Hann heldur annars, at vit kunnu læra av royndunum í Mexikanska Flógvanum. -Tann mest umrá›andi læran er, at um okkurt kann tykjast trupult nú, so n‡tist ta› ikki merkja, at ta› ikki er naka›, sum man ikki skal hyggja at. Tí hevur Oljumálast‡ri› lati› okkum fáa eitt 9-áraloyvi.

Sambart 9 ára loyvinum hava teir bundi› seg til at gera nakrar kanningar komandi 3 árini og út frá tí skulu teir so taka upp samrá›ingar um ví›ari gongdina.

2. útbjó›ing, sum kemur skjótt eftir 1. rundu, kann vera skilagó›, um boringin í Gullblokkunum ver›ur væleydna›. Um somu tí› vita vit, hvat nor›menn gera. Tá fund ver›a gjørd hjá teimum, so vísir ta› seg oftani, at teir vilja heldur lata tingini ganga spakuliga. Hetta er naka›, sum føroyingar mugu gera upp.

Scott Albertsson sigur, at hóast ta› sær bjart út fyri komandi leiting, nú løgini føroysku megin av Atlantsmótinum tykjast at vera framhald av løgunum bretsku megin marki›, so vita vit ikki, um somu strukturar ella jar›frø›i heldur fram ví›ari vestur eftir inni undir tí tjúkka basaltinum.

-Ta› er fyri at fáa hetta kanna›, at Oljumálast‡ri› hevur givi› 9 ára loyvini.

Oljufeløgini ganga saman um oljuhavn

Oljufeløgini hava í prinsippinum gjørt eina avtalu um at fara saman um at bi›ja um tilbo› uppá basatænastur. Men í sí›sta enda er ta› landsst‡risma›urin í oljumálum, sum ger av, hvar eitt nú basavirksemi skal ganga út frá

Útger›arhavn
Jan Müller

Tey f‡ra fyristø›ufeløgini, sum hava bundi› seg til at bora á føroyska landgrunninum komandi árini, hava gjørt eina innanh‡sis avtalu um at vera saman um at taka av einum tilbo›i um oljuútger›arhavn og um at brúka føroyskar vørur og tænastur í tann mun tær eru tøkar. Hetta merkir, at feløgini í prinsippinum hava gjørt eina semju um at fara saman um at bi›ja um tilbo› uppá basatænatur. Tilbo›i› kann bjó›ast út 1. januar vi› deadline til mars 2001. Máli› vil so vera at hava eina oljuútger›arhavn klára fyrst á sumri ella umlei› 1. juni.

Hetta gekk fram av fyrilestrinum, sum umbo›i› fyri ein av operatørunum, Amerada Hess, Gordon Minty helt í Nor›urlandahúsinum í gjár. Í einum ø›rum fyrilestri, sum ein av løgfrø›ingunum í Oljumálast‡rinum, Jógvan Elias W. Poulsen helt kom fram, at hóast oljufeløgini gera av at fara saman og taka av einum ávísum tilbo› í sambandi vi› útger›arhavn og tænastur, so hevur landsst‡risma›urin í oljumálum seinastu avger›ina. Hann kann sambart lógini broyta eina avger›, sum operatørfeløgini koma til. Ætlanin hjá feløgunum um skipan fyri vørur og tænastur skal gó›kennast av landsst‡rismanninum. Hesin fer neyvan at gera ta› óney›uga d‡rt fyri oljufeløgini, men hann hevur møguleikan at siga vi› feløgini, at tey ísta›in fyri t.d. bara at brúka eina havn skulu lata tveimum plássum arbei›i ella hann kann tvinga oljufeløgini til at taka av einum ø›rum tilbo›, um ta› ikki er nógv d‡rari.

So enn er langt frá nøkur endalig avger› tikin um, hvar komandi oljuútger›arhavnin/havnirnar skulu vera.

Ta› var annars Magni Arge, forma›ur í Oljubólkinum hjá Vinnuhúsinum, sum bey› vælkomin til oljurá›stevnuna. Eftir ta› tala›i Ey›un Elttør, landsst‡risma›ur. Meira enn 200 fólk eru vi› á rá›sstevnuni.

Tá oljurá›stevnan var› sett í gjár. Mynd Álvur Haraldsen